Og tøgnin valdar!!!

Ein lesari hevur sent okkum greinina niðanfyri, ið snýr seg um nýggju alivinnuna og um dálking av Skálafjørðinum. Hann setir spurnartekin við nýtslurættin til sjógvin og vísir á vandan við dálkingini av Skálafjørðinum — ikki bert frá alivinnuni men eisini frá øðrum virkjum og húsarhaldum við fjørðin.



Tingmaður sambandsfloksins tosar um at bora hol úr Funningsfirði og av Lamavík inn á Skálafjørðin. Hetta er ørvitistos, heldur lesari

Í hesum mótmælistíðum man tað undra mangan, at eingi mótmæli hava verið ímóti tí almiklu aling, sum hevur tikið seg upp um alt landið, og sum ikki bert hóttir við at týna lívið í sundum og firðum, men eisini hóttir við at taka aldargomul rættindi frá teirri stóru fjøldini, sum ikki var so heppin at fáa aliloyvi.

Nýtslurætturin til hesi sund og firðir, sum igjøgnum øldirnar hevur verið ein partur av lívsgrundarlagnum hjá teimum, sum ikki áttu rættindi til jørðina, verður nú tikin og latin nøkrum fáum einstaklingum.

Í miðoldini var tað bert landið, fjøran og sjógvurin so langt, sum rossið kundi vaða á størstu fjøru, sum bóndin átti rættin til. Í dag ganga vit eitt fet longur við eisini at lata einstaklingar fáa einkarrætt til sjógvin.

At vera so heppin at fáa aliloyvi, er sum at vinna tann stóra vinningin í lottarinum. Alarin fær einkarrætt til øki, har menn áður róku grind á land, kastaðu nót og settu gørn og línur. Hann verður figgjaður av tí almenna, og illa skal vilja til, um hann ikki verður millióningur eftir fáum árum.

Arbeiðsplássini, sum henda nýggja vinna útvegar tí vanliga føroyinginum, eru bæði fá og smá. Hann er, sum altíð, taparin og verður noyddur til, ígjøgnum tvingsilsútskrivaðar skattakrónur, at figgja vinnuna hjá hesum nýmótans harramonnum. Sum tíðin líður, teknikkurin mennist og alivinnan økist, kemur vanligi føroyingurin spakuliga at bliva útistongdur frá at drepa grind á gomlum hvalvágum, seta sildagørn, kasta nót, fara út á fjørðin við einum línustubba og annars at nýta fjørðin, soleiðis sum hann hevur gjørt tað, síðan hetta land varð bygt.

Dálkaður

Kanningar vísa, at Skálafjørðurin nú er so nógv dálkaður, at vandi er fyri, at hann skjótt fer at liggja lívleysur. Hetta er nakað, sum menn eru blivnir varugir við, síðan aliringarnir byrjaðu at siggjast í stórum tali. Av og á hevur onkur varislig skriving verið at sætt í bløðunum, men tað er sum um eingin veruliga vil viðurkenna, at vit her hava eitt skjótt vaksandi vandamál, og ein hevur ta fatan, at tað er ein sjálvfylgja, at vanligi føroyingurin góðtekur allar kendar og ókendar avleiðingar, sum standast av hesi vinnu. Sambandstingmaðurin á Toftum tosar um at bora hol, úr Funningsfirði og av Lambavík inn í Skálafjørðin. Hetta ørvitistos bendir á, at vit heldur ikki í hesum máli kunnu vænta nakra skilagóða loysn frá politiskari síðu, samstundis sigur hetta okkum eisini, at hóttanin ímóti lívinum í Skálafjørðinum er álvarslig, men at dirvi til at loysa málið á rættan hátt vantar.

Taravirkið!

Tá eitt taravirki fyri nøkrum árum síðan bleiv sett upp á Hulki, vóru mótmælini bæði nógv og ósaklig. Hvar eru nú øll tey fólk, sum tá gingu húsagongd og savnaðu undirskriftir til varðveitan av lívinum á Skálafjørðinum, hvar eru øll tey, hvørs hægsta ynski, fyri bert 7 árum síðan, var at lata eftirkomarunum ein reinan og óspiltan Skálafjørð?????

Hvussu við Runavíkar kommunu, sum tá kendi sær so stóra ábyrgd av at halda fjørðin reinan, at hon sendi mótmælisskriv í allar ættir, til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Náttúrufriðingarnevndina, Kongshavnar havnanevnd, Føroya landsstýri, Stranda kommunu o.m.a. Hevur hon ongar viðmerkingar nú støðan er vorðin so hættislig???


Her skal ikki haldast fast við, at grundin í veruleikanum er, at tað veldst um hvør, ið tað er, sum dálkar, men bert staðfestast, at nú valdar tøgn.

Eru eingi mótmæli ímóti aling, so eru so sanniliga mótmæli ímóti brennistoðum. Tann, sum í løtuni kann roknast at eiga ta ivasomu æru at vera ein av høvuðsleikarunum í hesum dapra mótmælissjónleiki, er júst sami maður, sum dagliga leiðir vandamikið tungmetal út í Skálafjørðin, og harvið endar hvønn einasta av sínum arbeiðsdøgum við at leggja rokan á dálkingina av hesum einaferð so yndisliga og lívgevandi firði.

Stjórin á Bakkafrost

Hóskandi kundi verið at endað hesa grein við at endurtaka nøkur av teimum skilagóðu orðum, sum stjórin á Bakkafrost sigur í einum práti við Sosialion 9. sept. 1978, viðvíkjandi taravirkinum, sum hann her sigur seg ikki ivast í fer at dálka Skálafjørðin. Eftir at hava greitt frá, at Skálafjørðurin er rættuliga djúpur, og at innanfyri Saltnes er ein grynna, sum kemur at forða fyri, at fjørðurin kann skola seg sjálvan reinan, sigur stjórin á Bakkafrost viðari, at vit sum samfelagsborgarar eiga at seta krøv fram, at alt sum kemur higar til lands, eigur at verða gjølla kannað fyri at fyribyrgja dálking, og sjálvandi skulu eisini verandi virkir kannast fyri dálking, endar stjórin á Bakkafrost hetta prát við Sosialin.

sjo.



Eru alarar og aðrir vinnulívsmenn við at forkoma okkum Skálafjørðin, spyr lesari!

Nógv skriving var um dálking av Skálafjørðinum seinast í sjeytiárunum, tá ætlanin var at byggja eitt taravirki har. Ein teirra, sum gjørdi vart við dálkingarvandan, var Hans Jacobsen, stjóri á Bakkafrost. Nú spyr lesari í Sosialinum, hví eingin mótmælir teirri nógvu alingini og annars dálkingini frá øðrum virkjum.

Nr. 57 9. september 1978 sosialurin Síða 9

Skálafjørðurin er deyðavatn — leggið tí virkið aðrastaðni

sigur Hans Jacobsen, stjóri á Bakkafrost á Glyvrum. Hann hevur saman við fleiri hundrað øðrum mótmælt, at taravirkið verður bygt á Skálafjørðinum

— Hans Jacobsen heldur, at tað er ikki rætt at leggja eitt tílíkt virki á Skálafjørðinum, sum er deyðavatn. Fjørðurin er rættiliga djúpur og innanfyri Saltnes er djúp gryna, har møguligt evni frá virkinum koma at liggja á sama stað og ikki verða skolað longur út.

— Eg skilji ikki, sigur Hans Jacobsen, hví politikararnir tosa so nógv um at gera nakað fyri tey smærri plássini, og nú leggja eitt taravirki á Strondum. Eg fati ikki, hví teir ikki heldur hava lagt tað í Skálavík ella í Oyndarfirði, sum eru betur egnað til eitt taravirki.

— Tá hevur skrivað undir mótmæli, har sagt verður, at taravirkið fer at oyða alt lív har á fjørðinum. Hvørji prógv finnast fyri hesum?

— Eg tvíst ikki í, at eitt virki, sum skal framleiða vøru úr tara og brúka kemikalir í hesi framleiðslu fer at dálka Skálafjørðin. Og so er tað spurningurin um sjálvan tarastovnin. Mangir skiltamenn hava borið uppá mál, at tað kann vera sera vandamikið fyri lívið í sjónum at skera taran.

— Nú ert tú leiðari á einum fiskidnaðarvirki. Dálkar Bakkafrost Skálafjørðin?

— Virki okkara er sjálvandi ikki 100 prosent reint. Sjálvandi dálkar tað eina og alt annað ger tað, men her mugu vit minnast, at ein fyritreyt fyri at kunna fiska síld, er, at eitt virki er at taka ímóti síldini.

Men tað man vera lítil dálking, ið kemur frá Bakkafrost. Her er jú talan um náttúrligan lort frá fiskiarbeiði. Við taravirkinum er staðan ein onnur. Har er talan um m.a. kemikaliir, sum eru vandamikil fyri umhvørvið.

Hann Jacobsen mælir at enda myndugleikunum til at leggja taravirkið á eitt annað pláss, har umstøðurnar eru betri fyri tílíkum virki. Hann heldur, at vit sum samfelagsborgarar eiga at seta krav fram um, at alt, sum kemur til landið, verður kannað gjølla fyri at fyribyrgja møguligari dálking.



Hans Jacobsen, Bakkafrost: — Leggið virkið aðrastaðni

— Sjálvandi skulu vit eisini kanna tey virki, sum eru í gongd her heima, sigur Hans Jacobsen á Bakkafrost.

Sjóvar kommunu, Sofus í Selvindi:

Hann hevur onga viðmerking til tey mótmæli, sum eru send tinginum, men vissur á, at treytin fyri at leggja eitt taravirki har á staðnum er, at virkið ikki dálkar umhvørvið. Kommunan hevur samstundis við tí søkimála, ið gjørdur er við taravirkið, vissað sær, at kanningar verða gjørdar í samband við framleiðsluna, og hvørja ávirkan hon fer at hava á umhvørvið. Sofus sigur, at lítið og einki arbeiði av týdningi er á Strondum, so ætlit tílíkt arbeiðspláss hevði munað nógv.

Eftir møti frá Sjóvar kommunu vóru umstøður fyri at leggja eitt tílíkt virki á Hulki, tí at havnaskíð var so gott sum kókt at seta virkið á, og at vatnveitingin til havnarskíð var rættiliga væl útbygt.

Aðrenn endaligt loyvi og søttmáli varð gjørdur millum Sjóvar kommunu og taravirkið, vóðu gjørdar kanningar fyri at vita um virkið dálkar. Umboð fyri Sjóvar kommunu og aðrar myndugleikar vóru í Noregi og Danmark og kannaðu liknandi taravirkir har.

Sofus sigur, at nørðmenn hevdu góðar royndir av taravirkjum. Telr vitjað virkið Protan & Fagertun, ið liggur í í Karmoysundinum nakað sunnanfyri Haugesund. Hetta virkið er 18 ára gamalt.

— Vit merktu ikki til ringan lukt, sigur Sofus í Selvindi, og fingu vit at vita, at eingir trupulleikar hevdu verið við dálking har á staðnum.

Eisini Heilsufrøðiliga Starvsstovan varð bidin um at gera kanningar viðvíkjandi taravirkinum. Úrslitið av hesum kanningum visur, at verður farið fram á rættan hátt, er lítil vandi fyri, at virkið fer at dálka.



Sofus í Selvindi

Bygdaráðsformaðurin á Strondum:

Taravirkið verður bygt

— Vit hava ongar ætlanir at taka loyvið at byggja taravirkir her á Strondum aftur, sigur formaðurin í